# Ófriðarligt í Runavík



*Vikuskiftið var merkt av ófriði í Runavík og týsdagin fór ein bilur útav í Skálabotni*

DAGFINN OLSEN

Klokkan 19:47 týskvøldið fekk politiið í Runavík fráboðan yvir alarmin. Ein bilur var farin av vegnum í Skálabotni.

Talan var um persónbil, ið hevði alt ov nógva ferð, sigur løgreglan í Runavík.

Bilurin kom úr Skálbotni, men kláraði ikki at steðga, tá hann nærkaðist landsvegnum við bensinstøðina. Hetta, hóast førarin stóð á bremsuni. Bilurin fór tískil yvir um landsvegin og kroystist inn í bakkan hinumegin.

Í bilinum vóru 3 mans, millum 19 og 20 ára gamlir. Teir vórðu fluttir á Landssjúkrahúsið til eftirlit fyri heilaskjálvta og smærri snuddir. Løgreglan sigur, at rúsdrekka var uppí óhappinum.

**Harðskapur**

Um vikuskiftið var tiltak og dansur í høllini í Runavík. Klokkan 05:10 fekk løgreglan fráboðan um, at ein maður var sligin í andlitið við eini fløsku, ið brotnaði, so hann skar seg illa. Eisini breyt hann nøsina.

- Maðurin dettur og fær síðani tvey spark í andlitið, sigur løgreglan, ið metir hetta sum ráðan harðskap.

Maðurin varð fluttur á sjúkrahús. Løgreglan veit, hvør framdi illgerðina, og viðkomandi hevur játtað seg sekan.

Løgreglan sigur, at ofta hendir slíkt úti og eftir dansin. Sunnudagin kom fráboðan til løgregluna í Runavík, at ein annar bardagi eisini hevði verið eftir dansin. Tveir mans høvdu sligist og talan var um smærri snuddir.

*Ein maður var offur fyri ráðum harðskapi í Runavík sunnumorgunin*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Náttúra, ljós og menniskju í Norðurlandahúsinum

*Í dag klokkan 17 letur upp framsýning hjá norsku Lailu Olsen, ið síðani 1997 hevur búð í Nuuk*

DAGFINN OLSEN

Í dag letur upp framsýning í Norðurlandahúsinum við myndum hjá Lailu Olsen. Hon er fødd í Vesterfold í Noreg. Hon búði frá 1973 til 1997 á Als í Danmark. Í 1997 flutti hon til Nuuk í Grønlandi.

Laila Olsen er útbúgvin á Sønderjyllands Kunstakademi, umframt Holbæk Kunshøjskole. Hon hevur í mong ár arbeitt við myndum og skurðmyndum og hon undirvísir eisini í hesum.

Íblástur fær Laila einamest frá náttúrni, ljósinum og menniskjum. Hon hevur áður havt framsýningar á listasøvnum, skúlum, bókasøvnum, ráðhúsum og stovnum í Danmark. Seinast hevði hon framsýning á Landsbókasavninum í Nuuk og í grønlendska mentanarhúsinum, Katuaq.

Laila Olsen hevur framsýning í Føroyum til 4. juni 2000.

# Nýtt Snirr og Strok

NEIL JOENSEN

Tað nýggja blaðið av Snirr og Strok er júst útkomið og hevur nógv gott at bjóða hesaferð. Haldarakappingin endar, og møguligt er at vinna eina familijuferð til Danlands við Norrønu í summar. Tað seinasta petti til myndina er við hesaferð, so tað er bara at klippa, líma og senda tað inn til Barnablaðið.

Í Snirr hesaferð er nógv at velja ímillum. Millum annað er Tíðinda Fróði har, og vit síggja børnini skriva og tekna. Gløggi Blobb er eisini við í blaðnum, og hesaferð fer hann at siga eitt sindur um apurnar. Eisini verður møguligt at lesa ferðafrásøgnina um 5. flokk úr Oyra skúla sum fór til Vimmerbý. Fríkorterið, Í Glugganum, Bíbliusøga, Dunnaldur Dunna og m.a er við. Eisini er ynskimyndin við, hesaferð av tí kenda bólkinum Savage Garden.

Í Strok hesaferð bjóðar Tíðinda Fróði okkum nýggj tíðindi. Við hesaferð er tað aktuella evni Happing har tosa verður við Rógva Thomsen sum er lærari hjá lærarum og pedagogum. Eisini verður tosa við 6. flokk í Vágs skúla sum júst hevur arbeitt við evinum happing. Kærleikin svíður er ein góð stutt søga um tveir dreingir sum geva seg at berjast um eina gentu og blíva óvinir uppá hendan mátan. Blits - søtt og súrt um tey kendu, Úr søguni: Tá ið Magnus Heinason fann Grønland, Krossorðagátan, Gaman og nógv nógv annað. Eisini ber til at lesa um tann kenda bólkin Savage Garden, og eisni er ynskismynd av teimum.






Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Kaggin
KJØLAR
spæla til dans fríggja- og leygarkvøldið
Leygarkvøldið verður skerpikjøtaveitsla
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og kollafjørð,tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO
311234

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Fríggjakvøldið og sunnukvøldið
SPÆLIMENNINIR
CAFÉ NATÚR
Sosialurin - 311820

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

fk Matseðilin
Hósdagin 11. mai:
Bankikjøt
Fríggjadagin 12. mai:
Skinkusnitzel
Leygardagin 13. mai:
Enskur búffur
Mánadagin 15. mai:
Medistarapylsa
Týsdagin 16. mai:
Bostonsteik
Mikudagin 17. mai:
Hamburgararygg
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 13. mai verður dansur "FLÚRAR" spæla
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

Lesið sosialin -tað loysir seg

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

**Vilja tygum vi› í**

***Í b‡in*** - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur